## AaB fekk ein hvøkk

AaB tók enn eitt fet ímóti gullinum í superliguni, eftir at liðið vann á Randers í gjárkvøldið. Men teir úr Aalborg fingu ein hvøkk í seinna hálvleiki. Michael Jakobsen legði AaB á odda 1-0 eftir 57 minuttir, men bert 10 minuttir seinni fekk Randers brotsspark. Kenneth Møller Pedersen misnýtti tó gylta møguleikan at javna. Eftir hetta fór gassið av ballónini hjá Randers, og AaB økti upp í 3-0. Málini skutu Jeppe Curth og Simon Bræmer. AaB liggur sjey stig frammanfyri nummar 2 í superliguni. FCK megnaði heldur ikki í kvøld at vinna, og eftir javnleikin ímóti AGF er FCK dottið niður á fjórða pláss.



## B36 selur hosurnar

B36 og Tryggingarfelagið Føroyar hava gjørt stuðulsavtalu, har hosurnar verða nýttar sum lýsingapláss. Um tað er fyri at tryggja móti brunasárum á knøunum, verður einki sagt um, men í B36 halda tey, at hetta er ein upplagdur møguleiki at geva lýsarum eitt serstakt pláss. Ikki minst tí beinini aloftast eru við, tá myndir verða tiknar. Eitt nú sum á myndini, har Klæmint Matras ger seg til reiðar at skjóta brotsspark.

B36-EB/Streymur:

# Taparin missir takið

**Bæði B36 og EB/ Streymur halda stutt tjóður í oddaliðnum. Men tað krevur ein sigur, um tann støðan skal haldast um vikuskiftið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast tey flestu mettu, at B36 ikki veruliga fór at gera um seg í oddinum í ár, so er "nýggja" liðið enn millum tey ovaru á stigatalvuni.

Gaman í hava teir framvegis ikki verið uttan fyri Gundadal, og tað skulu teir heldur ikki hesaferð. Men tjóðurið upp til grannarnar er bert tvey stig, og tí er umráðandi at vinna, um munurin ikki skal økjast

Í mun til dystin seinasta vikuskiftið, tá eitt skert B36-lið við bit og slit basti Víkingi, eru fleiri spælarar nú tøkir aftur.

Klæmint Matras, sum hevði leikbann, er til reiðar at tørna útaftur, og tað sama eru Hanus Thorleifsson og Odmar Færø, sum báðir hava drigist við skaðar. Einasta fráveran er Ingi Højsted, sum enn má bíða nakrar vikur, áðrenn hann aftur kann spæla.



*Bæði B36 og EB/Streymur hava verið við til at mynda oddin av føroyskum fótbólti seinastu tvey árini. Dysturin sunnudagin fer helst at geva eina greiða ábending um, hvussu styrkin á liðunum er í ár*

- Ta er ein sera góður stemningur í hópinum, og eg haldi, at vit hava nakrar typur, sum rigga væl sum ein eind, og har allir stríðast fyri hvørjum øðrum, sigur Klæmint Matras, sum er liðskipari hjá liðnum.

Og hann leggur afturat, at hann als ikki er bilsin av, at B36 hevur staðið seg somikið væl higartil.

- Tað eru vit ikki. Tvørtur ímóti, so haldi eg, at vit enn ikki hava víst, hvør veruligur dugur er í okkum. Seinasta dyst spældu vit í øllum førum ikki væl, men alt í alt hevur tað kanska slettis ikki sæð so galið út. Og tá vit so eisini vinna, hóast spælið ikki er av tí besta, er tað væl eisini bara ein styrkir, heldur hann.

### Uttan skiparan

Hjá EB/Streymi er Egil á Bø einasti spælarin, sum ikki fær verið við. Liðskiparin fekk reytt kort, tá EB/ Streymur spældi á Sandi seinasta vikuskiftið, og hann verður tí millum áskoðararnar í Gundadali.

Og hann ivast ikki í, at hann er spentur undan dystinum.

- Bæði liðini hava í løtuni sjey stig, og tann, sum fer av vøllinum sum vinnari, er í eini sera góðari støðu. Taparin noyðist hinvegin at stríðast nakað meira, so eg vóni í øllum førum, at vit fáa stigini við okkum, sigur Egil á Bø.

Nøkrum løttum dysti roknar hann tó ikki við.

- Tað sær út til, at B36 hóast alt verða rættiliga drúgvir í ár. So talan er um ein ógvuliga týdningarmiklar dyst fyri okkara viðkomandi, sigur Egil á Bø.

Víkingur-NSÍ:

# Langt millum heimasigrarnar

**Nógvu tey seinastu árini hevur NSÍ havt stak gott tak á, tá ið teir í Runavík hava spælt í Sarpugerði**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrsti dysturin í 4. umfari verður longu í dag í Sarpugerði. Tað hevur verið eitt sindur av iva um, nær fyrsta brikslið verður. Onkrastaðni hevur tað verið nevnt, at dystarbyrjan skuldi verða klokkan 15, men tað er ikki rætt. Fyrsta bríkslið í oyggjauppgerðini millum Víking og NSÍ verður klokkan 18. NSÍ spælararnir skulu ganga flaggdagsskrúðgongu, áðrenn teir saman við viðhaldsfólkunum fara um Gøtueið.

Talan er sjálvsagt um fyrstu uppgerðina í landskappingini millum Víking og NSÍ. Men harfyri ber til at staðfesta, at NSÍ plagar at standa seg væl í Sarpugerði. Tølini siga, at síðsti heimasigurin í Sarpugerði ímóti NSÍ var í 2000, tá ið GÍ vann 1-0.

Síðani hava tíggju dystir verið spældir í Gøtu millum GÍ og NSÍ. Fimm ferðir hevur NSÍ vunnið, og fimm ferðir hevur tað verið javnt. Í fjør vann NSÍ báðar dystirnar í Gøtu.

Hjá Víkingi eru allir tøkir uttan álopsspælarin Adrian Joensen. Orsakað av trupulleikum við lærkrikanum var hann ikki við, tá ið Víkingur tapti tepurt 2-1 í Gundadali ímóti B36. Adrian hevur ikki vant í hesi vikuni, og hann verður ikki við í dag.

Hjá NSÍ hevur tað í vikuni ikki staðið so væl til við fólki, men tað verður roknað við, at allir fara at vera tøkir í kvøld. Óli Hansen hevur verið burturstaddur alla vikuna, men hann kom til hús aftur seint í gjárkvøldið. Nenad Stankovic hevur havt onkran smásnudd, sum hevur havt við sær, at hann ikki hevur verið førur fyri at venja við fullari ferð, men eingin ivi er um, at týdningarmikli miðvallarin verður tøkur í dag.

Einar Hansen hevur ikki vant við fullari ferð, men hann verður tøkur, og nú er Øssur Dalbúð komin fyri seg aftur, eftir at hann í meiri enn tvær vikur hevur verið plágaður av skaða í knænum. Hann spældi unglingadystin ímóti 07 Vestur mikukvøldið á tamb.

B71-Skála:

## Nú skal B71 vinna

**Mótstøðan hevur verið knallhørð, men eftir bert eitt stig í trimum dystum eru sandoyingarnir noyddir at vinna, tá Skála vitjar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

EB/Streymur, HB og NSÍ verða mett sum tey trý liðini, sum fara at stríðast um gullið í ár. Tí kundu sandoyingar neyvan ætla sær eina truplari byrjan enn tað sama, og tí er tað kanska eingin vanlukka, at fyrstu dystirnir bert hava kastað trý stig av sær.

Hinvegin hevur tað verið høvuðsatvoldin til, at B71 er at finna nær botninum, og tað leggur trýst á spælararnar, nú liðið loksins sleppur at spæla móti einum av teimum, sum verður mett millum veikaru liðini.

Skála hevur av fleiri verið mett millum fremstu dumpikandidatarnar, men við trimum stigum hava teir higar til hildið seg omanfyri strikuna. Og tað er einki at ivast í, at teir fara eftir at ota seg longur upp á talvuna, nú tað ikki eydnaðist móti ÍF seinasta vikuskiftið.

Kanska tydningarmesti spælarin hjá Skála er Pauli G. Hansen, og spurningurin er so, um hann hesa ferð er til reiðar at byrja inni, eftir at hann bæði móti KÍ og Skála byrjaði dystin á beinkinum.

Hjá B71 er Símin Hansen aftur leikbannaður, eftir at hann fekk reytt kort í 2-2 javnleikinum hjá B71 móti EB/ Streymi.